# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1530.
# Tíðarskeið: 19/8-30/8 - 2015

**Fólk við frá Havstovuni:** Lis Larsen, Luis Ridao Cruz, Poul Vestergaard, Regin Kristiansen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund.

**Endamál:** Hetta var seinni túrurin av yvirlitstrolingunum á landgrunninum á heysti í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt varð vekt, tal og longdarbýti skrásett fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini vórðu magakanningar gjørdar av toski, hýsu og upsa, umframt av øðrum fiskasløgum. Hitin í sjónum varð máldur við miniloggarum.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Um túrin:** Fóru av Havnini hóskvøldið 20. august kl. 22. Vit byrjaðu eystan fyri Suðuroyarbanka og tóku støðir fra Munkagrunninum og norður móti Vágahavinum. Ein støð á Skeivabanka (XIII 16) var trupul at taka, tí vit skræddu tvær ferðir, og tí varð puntur XIII 20 tikin ístaðin. Landaðu mikudagin 26. august kl. 13 í Havn. Tilsamans vórðu 62 hál tikin, og av teimum vóru 58 góðkend. Veðrið var ógvuliga gott allan túrin.

**Prøvataking:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var eftir ætlan fyri øll fiskasløgini tosk, hýsu og upsa.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 31. august. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 1. november.

**Fyribilsúrslit:** Tað var væl meira at fáa av toski (74 %), serliga millumfiski, í mun til í fjør, men hetta komst mest av einum stórum háli vestan fyri Skúvoy, har veiðan var 4,6 tons. Tað var eisini meira at fáa av hýsu, reyðsprøku og gulllaksi í mun til í fjør. Hinvegin var minni at fáa av upsa og longu. Minni var eisini at fáa av makreli og sjóvarhitin var umleið eina grad lægri enn vanligt. Meira var at fáa av sild og onkrar av teimum vóru komnar nær gýting. Magakanningarnar vístu, at toskur át lítið av nebbasild í mun til tey árini, tá nógv var til av nebbasild. Toskur og hýsa ótu lítið av krabbadýrum í mun til onnur ár. Sum nakað nýtt hevði upsi etið fiskayngul. Orsøkin er helst, at fiskaynglið vaks sera seint í ár, og at ein partur ikki enn var farin niður á botn. Sjey merktir toskar vóru fingnir aftur, allir vestan fyri Skúvoy, har nógv er merkt av toski.

Yvirlitstrolingarnar í august byrjaðu í 1996, har 200 hál verða tikin á landgrunninum og 29 á Føroyabanka. Nøgdin av toski á føroyska landgrunninum hevur í fleiri ár verið lítil, tó at árið í ár er sum eitt miðalár. Hýsan hevur eisini verið illa fyri seinastu árini og sama er galdandi fyri upsa, trantkongafisk og stóra kongafisk (sí myndir aftast í hesi frágreiðing). Onkur fiskasløg, til dømis tunga, hava sveiggjað uttan nakra klára uppgongd ella niðurgongd. Onnur fiskasløg, so sum longa og reyðsprøka eru økt nógv í nøgd seinastu árini.

**Talva 1**. Veiða, og nytrur (aldrar) og magar tikin á túri 1530 og úrslit fyri báðar túrarnar.

| FISKASLAG | Túrur 1530 | | | Túrur 1528 | Tilsamans | Tilsamans í fjør | Lutfall |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 58 hál | Nytrur | Magar | 142 hál | 200 hál | 200 hál | |
| UPSI | 8302.675 | 316 | 76 | 11510.383 | 19813.058 | 27633.103 | 0.72 |
| HÝSA | 5709.155 | 324 | 107 | 12020.043 | 17729.198 | 14439.506 | 1.23 |
| TOSKUR | 7813.580 | 351 | 108 | 5153.117 | 12966.697 | 7468.791 | 1.74 |
| SVARTKJAFTUR | 1493.822 | 8 | | 9775.082 | 11268.904 | 9588.281 | 1.18 |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 2144.567 | | | 6961.713 | 9106.280 | 8633.395 | 1.05 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 1381.122 | | | 6790.496 | 8171.618 | 9919.716 | 0.82 |
| GULLAKSUR | 1020.143 | | | 5872.464 | 6892.607 | 4106.936 | 1.68 |
| LONGA | 735.539 | 32 | 1 | 3971.887 | 4707.426 | 6507.561 | 0.72 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 212.280 | | | 2366.249 | 2578.529 | 1874.024 | 1.38 |
| MAKRELUR | 175.192 | 5 | 6 | 1931.466 | 2106.658 | 2664.767 | 0.79 |
| HVÍTINGUR | 342.357 | | | 1608.593 | 1950.950 | 1310.807 | 1.49 |
| HAVMÚS | 868.218 | | | 405.472 | 1273.690 | 1471.856 | 0.87 |
| TUNGA | 169.222 | | | 893.281 | 1062.503 | 1044.122 | 1.02 |
| SILD | 15.935 | | | 994.940 | 1010.875 | 484.199 | 2.09 |
| KNURRHANI | 506.083 | | | 282.701 | 788.784 | 717.716 | 1.10 |
| BLÁLONGA | 100.115 | | | 626.210 | 726.325 | 509.052 | 1.43 |
| BROSMA | 158.288 | 9 | 2 | 556.240 | 714.528 | 564.399 | 1.27 |
| REYÐSPRØKA | 294.688 | | | 418.175 | 712.863 | 574.312 | 1.24 |
| SKRAMBUL | 225.012 | | | 485.223 | 710.235 | 632.796 | 1.12 |
| SILVURMURTUR | 136.942 | | | 400.143 | 537.085 | 197.905 | 2.71 |
| HAVTASKA | 116.786 | | | 282.635 | 399.421 | 330.069 | 1.21 |
| TRANTKONGAFISKUR | 210.120 | | | 183.154 | 393.274 | 813.308 | 0.48 |
| SVARTKALVI | 9.890 | | | 371.294 | 381.184 | 622.745 | 0.61 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 142.446 | | | 138.363 | 280.809 | 180.606 | 1.55 |
| TINDASKØTA | 5.090 | | | 237.915 | 243.005 | 122.157 | 1.99 |
| SANDSPRØKA | 70.008 | | | 147.374 | 217.382 | 138.282 | 1.57 |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 55.286 | | | 86.770 | 142.056 | 139.827 | 1.02 |
| LÍTLA BROSMA | 41.595 | | | 99.949 | 141.544 | 164.263 | 0.86 |
| LOLIGO | 2.095 | | | 135.769 | 137.864 | 445.864 | 0.31 |
| HVASSASPREK | 5.826 | | | 117.092 | 122.918 | 97.966 | 1.25 |
| LÁLLA | 35.560 | | | 78.901 | 114.461 | 81.020 | 1.41 |
| LÝRUR | 33.870 | | | 75.666 | 109.536 | 80.930 | 1.35 |
| HVÍTASKØTA | 0.000 | | | 98.582 | 98.582 | 0.000 | |
| SKØTA | 5.800 | | | 84.045 | 89.845 | 134.060 | 0.67 |
| STEINBÍTUR | 14.339 | | | 49.497 | 63.836 | 47.215 | 1.35 |
| GLASKVOYSA | 20.488 | | | 27.502 | 47.990 | 45.236 | 1.06 |
| HALAHVASSA SKØTA | 0.000 | | | 40.400 | 40.400 | 0.000 | |
| BUKSVARTI HÁVUR | 36.317 | | | 0.000 | 36.317 | 41.433 | 0.88 |
| BLÁGÓMUR | 2.630 | | | 33.500 | 36.130 | 13.410 | 2.69 |
| LYCODES ENDIPLEURISTCTUS | 0.000 | | | 32.328 | 32.328 | 11.377 | 2.84 |
| KALVI | 0.000 | | | 30.335 | 30.335 | 63.270 | 0.48 |
| KLINGRUSKØTA | 0.000 | | | 18.100 | 18.100 | 9.847 | 1.84 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 4.100 | | | 10.890 | 14.990 | 34.358 | 0.44 |
| JÁKUPSSKEL | 0.000 | | | 12.614 | 12.614 | 7.380 | 1.71 |
| GLÝSUFISKUR | 4.996 | | | 4.940 | 9.936 | 21.984 | 0.45 |
| ROSSAMAKRELUR | 0.000 | | | 9.638 | 9.638 | 155.051 | 0.06 |
| LÝSINGUR | 7.965 | | | 1.540 | 9.505 | 4.865 | 1.95 |
| ULVFISKUR | 0.000 | | | 2.721 | 2.721 | 8.982 | 0.30 |
| KRYTTLINGUR | 0.000 | | | 2.543 | 2.543 | 0.000 | |
| KRØKILSKRUTT | 0.000 | | | 2.524 | 2.524 | 0.341 | 7.40 |
| SKØTA SP. | 2.521 | | | 0.000 | 2.521 | 0.000 | |
| STREYMSILD | 0.000 | | | 2.219 | 2.219 | 2.378 | 0.93 |
| NEBBASILD | 1.383 | | | 0.000 | 1.383 | 0.074 | 18.69 |
| REYÐKRABBI | 0.000 | | | 1.365 | 1.365 | 0.000 | |
| ELEDONE | 0.000 | | | 0.906 | 0.906 | 8.607 | 0.11 |
| RÆKJA | 0.532 | | | 0.116 | 0.648 | 1.146 | 0.57 |
| HUMMARI | 0.565 | | | 0.000 | 0.565 | 3.058 | 0.18 |
| TANNHØGGUSLOKKUR | 0.000 | | | 0.375 | 0.375 | 0.000 | |
| MURRIKRUTT | 0.000 | | | 0.148 | 0.148 | 0.008 | 18.50 |
| TRØLLAHUMMARI | 0.000 | | | 0.052 | 0.052 | 0.000 | |
| BRISLINGUR | 0.000 | | | 0.040 | 0.040 | 0.000 | |
| TILSAMANS | 32635.143 | 1045 | 300 | 75445.68 | 108080.8 | 104174.361 | |

**Viðmerkingar:** Smálutir av ymsum slagi eru skrivaðir í Tur1530d.doc.

Petur Steingrund


Toskur
40000
35000
30000
25000
20000
15000
10000
5000
0
Veiða (kg)
1996
1998
2000
2002
2004
2006
2008
2010
2012
2014
Ár


Hýsa
140000
120000
100000
80000
60000
40000
20000
0
Veiða (kg)
1996
1998
2000
2002
2004
2006
2008
2010
2012
2014
Ár



Upsi
140000
120000
100000
80000
60000
40000
20000
0
Veiða (kg)
1996
1998
2000
2002
2004
2006
2008
2010
2012
2014
Ár




Tunga
2500
2000
1500
1000
500
0
Veiða (kg)
1996
1998
2000
2002
2004
2006
2008
2010
2012
2014
Ár



Reyðsprøka
Veiða (kg)
800
700
600
500
400
300
200
100
0
1996
1998
2000
2002
2004
2006
2008
2010
2012
2014
Ár




Brosma
Veiða (kg)
1400
1200
1000
800
600
400
200
0
1996
1998
2000
2002
2004
2006
2008
2010
2012
2014
Ár



Longa
Veiða (kg)
7000
6000
5000
4000
3000
2000
1000
0
1996
1998
2000
2002
2004
2006
2008
2010
2012
2014
Ár




Gulllaksur
Veiða (kg)
14000
12000
10000
8000
6000
4000
2000
0
1996
1998
2000
2002
2004
2006
2008
2010
2012
2014
Ár


Stóri kongafiskur
Veiða (kg)
10000
9000
8000
7000
6000
5000
4000
3000
2000
1000
0
1996
1998
2000
2002
2004
2006
2008
2010
2012
2014
Ár


Trantkongafiskur
Veiða (kg)
2500
2000
1500
1000
500
0
1996
1998
2000
2002
2004
2006
2008
2010
2012
2014
Ár